# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kahn spælir enn í Europa



*Fagnaðurin hjá Oliver Kahn var bæði sjónligur og skilligur, tá Luca Toni við stútara í seinastu sekundunum sendi Michael Laudrup og Getafe úr UEFA-Cup kappingini*
*Mynd: Polfoto/AP*

## UEFA-Cup 1/4-finalur

**Zenit Petersborg-Bayer Leverkusen 0-1 (0-1)**
(Zenit Petersborg víðari við samanlagt 4-2)
0-1 Dimitry Bulykin

**Sporting Lissabon-Glasgow Rangers 0-2 (0-0)**
(Glasgow Rangers víðari við samanlagt 2-0)
0-1: Jean-Claude Darcheville
0-2: Steven Whittaker

**Getafe-Bayern Munchen 3-3 eftir longda leiktíð 1-1 (1-0)**
(Bayern Munchen víðari við 4-4 og fleiri útivøllarmálum)
1-0: Cosmin Contra
1-1: Franck Ribery
2-1: Francisco Javier Casquero
3-1: Braulio
3-2: Luca Toni
3-3: Luca Toni

**PSV Eindhoven-Fiorentina 0-2 (0-1)**
(Fiorentina víðari við 3-1)
0-1: Adrian Mutu
0-2: Adrian Mutu

**Alt bendi á, at Oliver Kahn hevði spælt sín seinasta europiska dyst, men í einum ótrúligum dysti eydnaðist Bayern Munchen at vinna seg upp á 3-3**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tíðin var farin um teir 119 minuttirnar. Hóast undirtippaða Getafe longu í 6. minutti hevði mest Ruben de la Red, tá dómarin onkursvegna metti hann hava nýtt neyðbremsuna, hevði Getafe hildið fast.

Menninir hjá Laudrup høvdu enntá leingi eina 1-0 leiðslu, men bara tveir minuttir fyri tíð hevði Ribery bjargað Bayern longda leiktíð. Her syrgdu Casquero og Braulio tó skjótt fyri, at Getafe aftur hevði fyrimun, men í seinna hálvleiki av longdu leiktíðini spældi Prato brádliga jólamaður, og so kundi altíð vandamikli Toni skapa spenning.

Oliver Kahn er í gongd við sítt seinasta kappingarár, og í eini roynd at leingja europisku livitíð sína í øllum førum eitt umfar afturat, rann hann fram við i seinasta álopinum hjá Bayern. Sjálvur fekk Kahn ikki fatur á bóltinum, men hann var kanska við til at skapa ótryggleika í verjuni hjá Getafe. Í øllum førum endaði alt við, at Toni við 20 sekundum eftir av dystinum kundi stúta Bayern Munchen upp á 3-3, og so kundu Laudrup, Faxe og teirra spælarar bara iðra seg um tað, sum kundi verið. Jú, fótbóltur er framvegis eitt spæl, har týskararnir aloftast enda ovastir, tá avtornar.

Skála-KÍ:

# Lagið er batnað á Skála

**Fleiri av stuðulsspælarunum frá í fjør, sum ikki hava verið at sæð higartil í ár, vera við ímóti klaksvíkingum, ið hava sakna onkrar spælarar**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Higartil í ár hevur tað verið soltið hjá bæði Skála og KÍ – bæði í steypakappingini og í fyrsta umfarinum í landskappingini.

Tí hevur tað serliga stóran týdning hjá báðum pørtum at vinna úrtøku, tá ið liðini hittast á Skála sunnudagin. Full úrtøka hjá Skála á heimavølli og ikki minni hjá klaksvíkingum á útivølli kann fara at vísa seg at fara at hava ógvuliga stóran týdning, hvussu gongdin og úrtøkan fer at verða næstu vikurnar.

Á Skála og um Skála liðið hevur verið nógv tosað, tí tað hevur verið trot upp á spælarar. Fokus hevur verið á teimum, sum undanfarnu árini hava verið stuðulsspælarar, men sum ikki hava verið við higartil í ár.

Hóast tungu byrjanina so eru lagið og mótið eitt sindur betri á Skála nú, tí tríggir av spælarunum, sum hava verið saknaðir, eru nú tøkir hjá John Petersen. Teir eru Pauli G. Hansen, Alexandur Johansen og Bárður Danielsen. Tað hevur eisini verið tosað um, at Bogi Gregersen og Rúni Rasmussen skuldu koma afturíaftur, men teir hava ikki enn verið og vant saman við besta liðnum.

Klaksvíkingar bíða framvegis eftir fyrsta heimadystinum. Hann skuldi havt verið síðsta sunnudag ímóti HB. Nú verður hann annan sunnudag ímóti HB. Undan heimauppgerðini ímóti javnaldranum í høvuðsstaðnum, skulu fótbóltsglaðu klaksvíkingarnir fylgja sínum liði út á Skála.

Jan Andreasen er framvegis ikki tøkur, og nú er ein annar verjuveteranur, Harley Bertholdsen, heldur ikki tøkur. Harley hevur trupulleikar í øðrum lærinum og verður ikki við á Skála.

Bjarni Jørgensen hevur ikki vant í vikuni, og í morgun var lítið sannlíkt, at hann verður ímillum teir fyrstu ellivu sunnudagin. Brasilski Anderson, sum ikki enn hevur verið á besta liðnum, verður í ferðalagnum út á Skála, og tað verður álopsspælarin Jósup Henriksen eisini.